

## Ymiskt

Verður loyvi veitt fleiri feløgum saman, skal samstarvsavtala um tað av loyvinum fevnda virksemið gerast ikki seinni enn 90 dagar eftir, at loyvið er veitt. Landsstýrismaðurin kann krevja, at avtalan verður broytt í nærri ásettan mun, jvb. § 16 í standardloyvinum.

Innan 30 dagar eftir, at loyvið er veitt, skal loyvishavarin veita trygd fyri, at hann kann lúka allar skyldur, sum liggja á honum sambært loyvinum. Landsstýrismaðurin skal góðkenna trygdina og kann krevja broytingar, jvb. § 24 í standardloyvinum.



Innan 3 mánaðir eftir, at loyvið er veitt, skal loyvishavarin leggja eina ætlan fyri landsstýrismannin til góðkenningar, um hvussu og hvar virksemið á landi verður skipað í leitiskeiðnum, jvb.§ 15, stk. 2 í standardloyvinum.

Gjørt verður vart við, at fyristøðufeløg skulu hava hóskandi útgerð til at basa oljulekum eins og eina bjargingartyrlu í tilbúgving í Føroyum, meðan borivirksemi fer fram.

Sambært § 7, stk. 3 í kolvetnislógini kann landsstýrismaðurin lata vera við at ganga innkomnum umsóknum á møti.

Umsóknir um loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum skulu vera Oljufyrisitingini í hendi í seinasta lagi 17. november 2004 kl. 12.00. Umsóknirnar skulu latast til:

Oljufyrisitingina
Brekkutún 1
Postsmoga 3059
FO-110 Tórshavn
Føroyar

Umsóknirnar, herundir fylgiskjølini, kunnu vera á føroyskum ella enskum máli.

Umsøkjarin skal lata umsóknina við fylgiskjølum inn í trimum prentaðum eintøkum. Harumframt skal eitt teldutøkt avrit av samlaðu umsóknini latast inn á lesifløgu. Fløgan skal kunna lesast í einum vanligum teldufløguspælara. Teldutøka avritið skal lættliga kunna lesast inn í Microsoft Office ella latast inn í pdf formati. Fløgurnar og fløguhúsarnir skulu vera væl merktir.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum miðar eftir at veita loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum í januar 2005.



## Tíðaravmarkingar fyri seismiska skjóting v.m.

Loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum sambært § 6 í løgtingslógini um kolvetnisvirksemi gevur loyvishavarunum rætt m.a. at gera forkanningar, herundir seismiskar kanningar, á økinum, ið loyvið fevnir um.

Tað er ein treyt, at loyvishavarin fylgir reglunum, ið til eina og hvørja tíð eru galdandi fyri forkanningarvirksemi. Gjørt verður vart við, at loyvishavarin í virksemi sínum skal sýna fyrilit mótvegis fiskiskapi og verju av fiskastovnunum.

Viðvíkjandi verju av fiskastovnum verður gjørt vart við, at økið, ið verður boðið út, er undir almennu regluni um, at einki seismiskt virksemi eigur at fara fram í tíðarskeiðnum frá 1. november til 15. apríl. Harumframt eigur onki seismiskt virksemi at fara fram á økinum sunnan fyri Føroyabanka og á Bankarygginum í apríl og í mai mánaði. Víst verður annars til brot 5 í standard forkanningarloyvinum viðvíkjandi tíðaravmarkingum fyri seismiska skjóting.

Viðvíkjandi fyriliti mótvegis fiskiskapi verður gjørt vart við, at meðan seismiskar kanningar verða gjørdar, hava loyvishavarar skyldu at taka fiskiveiðiumboð umborð á kanningarfarið. Víst verður í hesum sambandi til brot 6 í standard forkanningarloyvinum.

Viðvíkjandi leitiboringum verður gjørt vart við, at tað í løtuni ikki verða ásettar serligar tíðaravmarkingar í teigunum, ið verða boðnir út í øðrum útbjóðingarumfari.






OLJUFYRISITINGIN
Faroese Petroleum Administration

Brekkutún 1 • Postsmoga 3059 • FO-110 Tórshavn • Føroyar • Tlf. 35 70 70 • Fax 35 70 75 • ofs@ofs.fo • www.ofs.fo

# INNBJÓÐING

## at søkja um loyvi til oljuleiting



## Annað útbjóðingarumfar í Føroyum

OLJUFYRISITINGIN
Faroese Petroleum Administration



Bjarni Djurholm
landsstýrismaður
í vinnumálum

## Vælkomin til annað útbjóðingarumfar

Tað er mær ein stór gleði at bjóða oljuídnaðinum at søkja um loyvi til kolvetnisleiting á føroyska landgrunninum. Annað útbjóðingarumfar, sum vit nú fara í holt við, er at meta sum eitt náttúrligt framhald av arbeiðinum at finna kolvetni í rakstrarverdum nøgdum. Fýra brunnar eru boraðir, og hava teir økt munandi um kunnleikan til jarðfrøðina og givið okkum týdningarmiklar upplýsingar, sum verða lagdar til grund í komandi leitingini. Vit vilja eisini nýta høvið at vísa á nógvu møguleikarnar, sum enn ikki eru troyttir á Føroyaøkinum, og serliga møguleikarnar fyri at finna sera stórar kolvetnisgoymslur.

Tað er í verki prógvað, at føroyska kolvetnis-umsitingin hevur megnað at lyft teimum arbeiðsuppgávum, sum hava verið tengdar at leitivirkseminum. Vit meta harumframt, at vit hava eina kappingarføra loyvis- og skattaskipan, soleiðis at feløg, sum velja at gera íløgur á føroyska økinum, hóast váðin kann tykjast stórur, kortini hava møguleikar fyri stórum vinningi.

Tað er av stórum týdningi fyri menningina av føroyska samfelagnum, at okkara fyritøkur og stovnar fáa møguleika at vera við í tí arbeiði og teimum verkætlanum, sum eru tengdar at leitivirkseminum, og tí fer tað at hava týdning, í hvønn mun umsøkjarar taka atlit til føroyska luttøku í teirra virksemi. Vit vilja stremba eftir at fáa eitt so gott og fruktabart samstarv við oljuídnaðin sum gjørligt, har dentur verður lagdur á, at virksemið verður útint trygt og skynsamt mótvegis okkara náttúruumhvørvi.

Mín vón er, at annað útbjóðingarumfar fer at verða eitt týðandi stig á leiðini til eitt sterkt føroyskt samfelag við fjøltáttaðum vinnu-møguleikum og einum støðugum búskapi.



## Lýsing eftir umsóknum um loyvi til oljuleiting

Sambært § 7, stk 1 í løgtingslóg nr. 31 frá 16. mars 1998 um kolvetnisvirksemi, hereftir nevnd kolvetnislógin, lýsir landsstýrismaðurin í vinnumálum hervið eftir umsóknum um loyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum á føroyska landgrunninum. Økini, sum verða boðin út, og almennu treytirnar, ið verða settar loyvishavarum, eru ásett í løgtingslóg nr. 27 frá 17. mai 2004 um annað útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum, hereftir nevnd útbjóðingarlógin.

### Umsøkjarar

Loyvi kunnu veitast føroyskum partafeløgum ella útlendskum partafeløgum við deild skrásettari í Føroyum. Deildin skal verða skrásett í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at loyvið er veitt.
Partapeningurin hjá partafelagnum skal í minsta lagi vera DKK 1.000.000.

Feløg kunnu søkja um loyvi hvør sær ella saman. Í hesum skjali verður heitið "umsøkjari" eisini nýtt um samtøk av feløgum, sum søkja um loyvi saman.

Søkja fleiri feløg saman, skal ætlaða fyristøðu-felagið upplýsast í umsóknini.

### Útboðsøkið

Hesir teigar á føroyska landgrunninum verða boðnir út, jvb. § 2 í útbjóðingarlógini:

6004/2b, 3b, 4, 5, 6b, 7b, 8b, 9, 11b, 12b, 13b;
6005/1-3, 4b, 5b, 10, 15b, 17, 22, 23;
6103/1-9, 11-13, 16, 17, 21, 26;
6104/2-5, 7-10, 12-15, 17b, 18-20, 22-25, 27-30;
6105/22-24, 26-29;
6202/11-14, 16-18, 21, 22, 26;
6203/11-30;
6204/22-25, 27-30;
6007/16, 17, 21-24, 28-29;
5908/1, 2;
6008/26, 27.









Umsóknir um loyvi kunnu fevna um ein ella fleiri av omanfyri nevndu teigum og kunnu eisini fevna um partar av hesum teigum.

### Fortreytir fyri at fáa loyvi

Loyvi verða sambært § 6 í kolvetnislógini bert veitt umsøkjarum, sum hava neyðugan sakkunnleika, royndir, førleika og fíggjar-orku. Tað er ein treyt fyri at fáa loyvi, at tað almenna fær innlit í virksemið.

Umsøkjarar skulu eisini hava neyðugan førleika í heilsu- trygdar- og umhvørvis-viðurskiftum.

Tað er ein treyt fyri at fáa loyvi, at virksemi loyvishavarans hevur fyrilit mótvegis fiskiskapi og verju av fiskastovnum. Tíðar-avmarkingar fyri seismiskar kanningar v.m. eru prentaðar á síðu 5.

### Samráðingarevni

Almennu treytirnar fyri loyvini eru ásettar í útbjóðingarlógini við tilhoyrandi standardloyvi.

Oljufyrisitingin fer við støði í uppskoti frá umsøkjarunum at samráðast um hesar serstøku treytir fyri einstøku loyvini:

- Arbeiðsskránna fyri einstaka loyvi
- Tíðarætlanina fyri leitiskeiðið
- Viðurskifti, sum viðvíkja føroyskari luttøku í kolvetnisvirkseminum, herundir menning av vinnuførleika.

### Metingarstøði, tá loyvishavarar verða valdir

Fyri at tryggja, at føroyski landgrunnurin verður kannaður nágreiniliga og at føroyskt vinnulív fær veruligar møguleikar at taka lut í kolvetnisvirkseminum, fer dentur at verða lagdur á niðanfyri nevndu viðurskifti, tá loyvi verða veitt:

a) Jarðfrøðiligu fatanina og arbeiðsskyldur-nar, sum umsøkjarin vil átaka sær fyri gjølla at kortleggja oljuvánirnar og leita eftir kolvetnum á økinum, sum verður fevnt av loyvinum, herundir um umsøkjarin vil átaka sær at gera leitiboringar. Í øðrum lagi, í hvønn mun umsøkjarin vil stuðla kanningum við atliti at framtíðar oljuleiting á Føroyaøkinum.

b) Á hvønn hátt og í hvønn mun umsøkjarin vil arbeiða fyri at menna føroyskan vinnuførleika og tryggja veruligar møguleikar fyri luttøku í kolvetnisvirkseminum.



### Umsókn

Í umsókníni skulu vera hesar upplýsingar í hesi raðfylgju:

a) Navn og bústaður umsøkjarans umframt navn og bústaður hjá tí persóni, sum umboðar umsøkjaran mótvegis myndugleikunum í Føroyum, meðan umsóknin verður viðgjørd.

b) Umsóknarøkið lýst við landafrøðiligum krosstølum og avmarkað við breiddar- og longdarstigum víst við heilum stigminuttum, og við ávísing til teigatøl sum omanfyri ásett.

Søkja fleiri feløg saman, skal upplýsast hvussu stóran lut av loyvinum einstøku feløgini átaka sær og hvat av teimum er fyristøðufelag.

c) Uppskot um arbeiðsskyldurnar, ið umsøkjarin vil átaka sær fyri gjølla at kortleggja oljuvánirnar og leita eftir kolvetnum á umsóknarøkinum, og um tíðarætlanina fyri virkseminum, herundir uppskot um á hvønn hátt umsøkjarin vil stuðla kanningum við atliti at framtíðar oljuleiting á Føroyaøkinum.

d) Uppskot um hvussu og í hvønn mun umsøkjarin vil tryggja veruligar møguleikar fyri føroyskari luttøku, herundir menning av vinnuførleika, í kolvetnisvirkseminum.

e) Í fylgiskjali 1 skal vera ein samandráttur av umsókníni.

f) Í fylgiskjali 2 skal vera ein jarðfrøðilig meting av økinum, sum søkt verður um.

g) Í fylgiskjali 3 skal vera ein fíggjarlig meting av teimum leitimiðum, sum eru fevnd av umsókníni.

h) Í fylgiskjali 4 skulu vera upplýsingar og uppskot í sambandi við føroyska luttøku í kolvetnisvirkseminum.

i) Í fylgiskjali 5 skulu vera partafelags-upplýsingar.

j) Í fylgiskjali 6 skulu vera upplýsingar um førleika og royndir umsøkjarans viðvíkjandi heilsu, trygd og umhvørvi.

Oljufyrisitingin tilskilar sær rætt at krevja ískoytisupplýsingar.

Upplýsingarnar, sum verða givnar í umsókn-ini, herundir fylgiskjølunum, verða viðgjørdar í trúnaði, jvb. í hesum sambandi § 20 í standardloyvinum.

Umsóknir eiga í mesta lagi at vera 10 síður, fylgiskjøl ikki íroknað.

Umsøkjarar kunnu við at venda sær til Oljufyrisitingina fáa:

1. hornakrosstølini fyri útboðsøkið.
2. leiðreglur fyri at gera omanfyri nevndu fylgiskjøl.
3. útbjóðingarlógina við viðmerkingum.
4. standardloyvi til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum.
5. standard forkanningarloyvi.

Hetta tilfar er eisini tøkt á heimasíðuni hjá Oljufyrisitingini (www.ofs.fo).

### Ágáva

Fyri viðgerð av umsókn um hvørt loyvi sær verður kravd ágáva uppá DKK 50.000,-

Ágávan verður goldin Oljufyrisitingini kostnaðarfrítt á konto hjá Føroya Landsstýri í P/F Føroya Banka: SWIFT FIFBFOTX konto nr. 6460-2600058 (ref. FEE 102320-2520-0700-0100). Bústaður: Føroya Gjaldstova, Postsmoga 3, FO-110 Tórshavn, Føroyar. Avrit av kvittan fyri, at ágávan er goldin, skal vera hjáløgd umsókníni.





